# MÁLMENNING HJÁ FLEIRMÆLTUM BØRNUM



**Ráð og vegleiðing til pinkubarnaforeldur, ið hava hvør sítt móðurmál**

FØROYAMÁL

## Tá foreldur hava hvør sítt móðurmál

Sum foreldur hava tit stóran týdning fyri málmenningina hjá tykkara pinkubarni, og tískil er tað av alstórum týdningi, at tit í viðgongutíðini ella stutt eftir føðing tosa saman um málsliga uppaling.

Granskarar viðmæla, at foreldur sum útgangsstøði altíð tosa sítt móðurmál við sítt barn. Teir siga, at móðurmálið er tað málið, ein sum foreldur dugir best at læra frá sær, umframt at tað er kenslumálið. Harumframt fær barnið á tann hátt eisini møguleika ótarnað at samskifta við báðar familjurnar og at læra báðar mentanirnar at kenna.

> Fleirmælt børn hava ofta lætt við at læra onnur fremmandamál seinni í lívinum.

## At læra mál

Tá ið børn læra mál, ogna tey sær eina rúgvu av vitan um orð, mállæru, ljóðskipan og samskiftisreglur. Málsliga tilognanin byrjar longu fyrstu mánaðirnar eftir føðing og heldur á fram komandi árini.

Sum foreldur hava tit ein serligan leiklut í hesi stimbranini, tí pinkubarnið brúkar mest tíð saman við tykkum. Tit kunnu hvør í sínum lagi og á hvør sínum máli gera tykkum sum vana at fylgja einføldu ráðunum á næstu síðu, soleiðis at samskiftið millum tykkum og barnið gevur barninum so góðar fortreytir sum til ber at menna gott mál og góða málkenslu.

# 5 MÁLSLIG RÁÐ

1. Pjátrið við barnið longu frá føðing av. Gerið tykkum eisini beinanvegin til vana altíð at hava eygnasamband við barnið, tá ið tit pjátra við tað.
2. Tá ið barnið eftir nakrar mánaðir byrjar at geva ljóð frá sær, kunnu tit seta orð á ljóðini, sum tit halda, at barnið roynir at siga. Um barnið sigur „voff“, kunnu tit siga „Ja, hundurin sigur voff.“
3. Nýtið livandi kropsmál, tá ið tit práta við barnið, sum stuðlar undir tað, sum tit siga. Tit kunnu t.d. klappa, peika, nikka ella rista við høvdinum alt eftir, hvat ið talan er um.
4. Syngið barnasangir fyri barninum, t.d. sangir frá tykkara egna barndómi.
5. Lesið barnabøkur saman, t.d. litfagrar myndabøkur og aðrar bøkur, sum stimbra sansirnar.

Foreldur, sum hava føroyskt sum móðurmál, hava serliga ábyrgd at stimbra føroyska málið hjá barninum, tí føroyskt er samskiftismál í Føroyum.

Um bæði foreldur í verki vísa ein jaligan hugburð til føroyskt, kann hetta hava jaliga ávirkan á føroysku málmenningina hjá pinkubarninum.

## Hentar heimasíður

Fleiri heimasíður eru, ið eru hentar at kenna viðvíkjandi málmenning hjá børnum.

Á www.bokaklubbin.fo eru hópin av føroyskum barnabókum til pinkubørn, sum tit kunnu lesa fyri tí. Gransking vísir nevniliga, at lesnaður stimbrar málmenning. Teknar tú barnið sum lim í bókaklubbanum, fáa tit 8 bøkur sendandi heim um árið.

Á www.integration.fo eru góð ráð til tilflytarar og annað viðkomandi tilfar.

Á www.malmenning.fo eru bæði upplýsandi greinar og faldarar, sum snúgva seg um málmenning og lesivanar hjá børnum.

Á www.sernam.fo kunnu tit fáa málsliga ráðgeving til børn. Á heimasíðuni sæst eisini, hvussu til ber at seta seg í samband við starvsfólk á stovninum.

Hoff, Erika: Language Development (2009). · Myers-Scotton, Carol: Multiple Voices. An Introduction to Bilingualism (2006).

*Tekstur: Helena Kannuberg, 2021*
*Mynd: Arnholt Kjelnæs*
*Uttanríkis- og mentamálaráðið hevur stuðlað*

estra VÁSTI